# Løgmaður fekk ikki rætt

**Tað gjørdist Brasilia, sum vann stórdystin móti Onglandi, men leikliga var talan als ikki um stórdys**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hópur av sjónvarpshyggjarum kring allan heim mundu hava sett seg væl til rættist friggjamorgunin, tá fjórðingsfinalan millum Ongland og Brasilia var á skránni. Á pappírinum var talan um ein sannan gloypibita fyri fótbóltselskarar, og so gekk tað kortini, sum summi bóru ótta fyri.

**Linlig uppliving**

Leikliga var talan nevnliga um eina heldur linliga uppgerð, har tað mest sum bert var Brasilia, sum veruliga tordi at spæla, meðan onglendingarnir fyrst og fremst hugsaðu um verjuskyldirnar, fyri síðandi at dúva upp á skjótleikan hjá Michael Owen í álopspartinum.

Og hetta gav eisini úrslit, tá Lucio stórkiksaði í vandaleysari støðu, so Owen einsamallur við málverjanum kundi leggja bretar á odda.

Møguliga hevði talan verið um ein heilt øðrvísi dyst, um leiðslan helt sær til hálvleiks, men brasiliumenn vildu tað øðrvísi. Ronaldinho var maðurin aftan fyri málið, tá hann fullkomuliga snýtti Ashely Cole, fyri síðani at leggja til Rivaldo, sum ískaldur legði bóltin í handara málhorn.

Og beint eftir steðgin kom so avgerandi málið. Ongin – og so slettis ikki David Seaman – hevði roknað við, at Ronaldinho fór at skjóta beinleiðis upp á mál, tá Brasilia átti fríspark í høgru síðu. Men tað var júst tað, sum lítli brasiliumaðurin gjørdi, og uttan at Seaman hevði nakran møguleika at verja fyri, sigldi bólturin yvir í handara málhorn.

Ronaldinho fekk annars reyða kortið seinni í dystinum, tá Danny Mills fekk sum mest burturúr eini evaska lítlari stempling, men hóast teir tann seinasta tíman spældu við 11 monnum móti 10, so megnaðu bretar ongan tíð at leggja neyðuga trýstið á Brasilia, sum soleiðis vann seg fram til tiðju hálvfinaluna á rað í HM-høpi, og eftir at teir í undankappingini høvdu stórar trupulleikar, eru brasilianararnir nú stórfavorittar at vinna HM-heitið, sum – um so verður – verður hitt fimta í søguni.

Brasilia-Ongland 2-1 (1-1)
0-1: Michael Owen, 23
1-1: Rivaldo, 45
2-1: Ronaldinho, 50

# Týskarar koyra á

**Hóast eingin veruliga hevði roknað við teimum hesaferð, so hava teir enn einaferð vunnið seg fram millum tey seinastu fýra**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er prógvað ofta, og inniverandi HM-kapping er enn ein staðfesting av, at Týskland mest sum altíð stendur seg væl í HM-høpi.

Undan hesi kappingini hevði mest sum eingin veruliga roknað við teimum, men teir vunnu seg sannførandi úr bólkaspælinum, og nú tykjast teir saman við Brasilia at vera besta boðið uppá ein komandi heimsmeistara.

Fríggjadagin leiktu teir fjórðingsfinalu móti USA, og sum væntað, so megnaðu teir eisini at vinna hesa, men leingi stóð tó heilt nógv á.

Serstakliga var USA við yvirlutan fyrsta hálva tíma, men í einum trimum førum sýndi Oliver Kahn, hví hann verður mettur sum heimsins besti málverji, og so gekk tað, sum tað so ofta hevur gjørt. Týskland, sum hevur skorað lutfalsliga nógv mál við høvdinum, fekk enn eitt av slagnum, tá Michael Ballack var fyrstur á frísparksinnleggi, og frá somu løtu vóru tað týskarar, sum stýrdu dystinum.

Einstakar ferðir løgu amerikumenn framvið, men teir gjørdust ov stuttir, og tó at ein fjórðingsfinala fyri teirra viðkomandi er eitt flott avrik, so mundu teir tó vera vónbrotnir um, at tað ikki eydnaðist teimum at avgera, tá teir høvdu møguleikan til tess.

Týsklan-USA 1-0 (1-0)
1-0: Michael Ballack, 39

# Vertirnir í hálvfinaluni

**Suður Korea hevði ikki vunnið HM-dyst undan endaspælinum, men nú hava teir vunnið seg fram til hálvfinalunar**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ringt lag á spaniólum, eftir at teir leygardagin máttu ásanna, at teir aftur hesa ferð gjørdist ov stuttir at røkka avgerandi dystunum í einum HM-endaspæli.

Neyvan hava møguleikarnir nakran tíð verið so góðir, sum hesa ferð, nú teir møttu Suður Korea, sum hevði tikið øll á bóli við yvir høvur at hava vunnið seg til fjórðingsfinalurnar, men heldur ikki hetta hjálpti spaniólunum.

Tað var kanska heldur ikki tapið, sum fekk spaniólarnar at illneitast, men heldur hátturin, sum hetta kom uppá. Tvær reisur høvdu teir bóltin í málinum, og tvær reisur fullu óskiljandi dómar, sum tóku málið frá teimum aftur.

Fyrru ferðina dømdi dómarin fríspark, tá koreanar annars gjørdu sjálvmál, og seinnu ferðina varð bóltin dømdur at vera uttanfyri, áðrenn Morientes stútaði í kassan, hóast sjónvarpsupptøkurnar greitt vístu, at bólturin væl og virðiliga var innan fyri linjuna.

Sostatt gjørdi neyðugt við brotssparkskapping, og tá blaðungi Joaquin brendi fjórðu sponsku royndina, kundi Myung-Bo avgera alt við seinasta sparkinum.

Suður Korea-Spania 5-3 eftir longda leiktíð og brotsspørk
1-0: Hwang Sun-Hong (br.), 120
1-1: Fernando Hierro (br.), 120
2-1: Park Ji-Sung (br.), 120
2-2: Ruben Baraja (br.), 120
3-2: Seol Ki-Hyun (br.), 120
3-3: Xavi Hernandez (br.), 120
4-3: Ahn Jung-Hwan (br.), 120
5-3: Hong Myung-Bo (br.), 120

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Rivaldo | Brasilia | 5 |
| Ronaldo | Brasilia | 5 |
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Christian Vieri | Italia | 4 |
| Marc Wilmots | Belgia | 3 |
| Robbie Keane | Írland | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Fernando Morientes | Spania | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 3 |
| Ronaldinho | Brasilia | 2 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Jared Borgetti | Mexico | 2 |
| Michael Owen | Ongland | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Henri Camara | Senagal | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Ahn Jung-Hwan | Suður Korea | 2 |
| Michael Ballack | Týskland | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |
| Umit Davala | Turkaland | 2 |
| Brian McBride | USA | 2 |
| Landon Donovan | USA | 2 |

# Turkar longri enn nakrantíð fyrr

**Senegal misti møguleikan at gerast fyrsta afrikanska liðið í eini HM-hálvfinalu, tá Turkar eftir ein sera undirhaldandi dyst fingu gylta málið**

HM-FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Talan var avgjørt um ein av mest undirhaldandi dystunum í HM-kappingini, tá Turkaland og Senegal skuldu gera av, hvør teirra skuldi verða partur av hálvfinaluni í HMN-kappingini.

Hvørki av liðunum hevði nakran tíð áður vunnið seg so langt í HM-høpi, og tað var sjónligt frá fyrsta bríksli, at báðir partar eisini ætlaðu sær longri.

Fyrstu løtuna var tað serstakliga Senegal, sum herjaði á, og teir høvdu eisini bóltin í málinum ta einu ferðina, men tað málið varð kolldømt, tí undan hesum hevði ein Camara verið rangstaddur, tá hann á turkisku mállinjuni bjargaði skotroynd!

Spakuliga tók Turkaland yvir, og sum dysturin leið, so vóru tað helst teir, sum vóru naskastir, tó at Senegal í kvika og teknisk sterka Diuff alla tíðina hevði ein leikara, sum megnaði at fáa okkurt burtur longu framspælingunum.

Hóast undirhaldandi, so komu eingi mál í teimum 90 minuttunum. Serstakliga hevði turkiski málkongurin, Hakan Sukur fleiri góðar møguleikar, men málturkur hansara undir HM stóð við, og so gjørdist neyðugt við longdari leiktíð.

Undan hesum var Sukur skiftur út við Ilhan Mansisz, og hesin skuldi fáa avgerandi týdning fyri dystin. Bert tríggir minuttir vóru leiktir av longdu leiktíðini, tá hann var fyrstur á einum innleggi, og við høgra beini beindi bóltin yvir í handara síðunet.

Eitt gylt mál hjá Turkalandi, sum við hesum hevur leikt seg fram til fyrstu HM-hálvfinaluna í søguna hjá landinum.

Senegal-Turkaland 0-1 eftir longda leiktíð
0-1: Ilhan Mansisz,, 94



Sumba-FSV 2-2 (1-2):

# Javnt í oddadystinum

**Vágamenn vóru tíðliga á odda við tveimum málum, men sumbingar treiskaðust og vunnu kortini annað stigið**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Talan var um rættiligan oddadyst á Krossinum suðuri í Sumba leygardagin. FS Vágar, sum nú hevur tikið seg fram á væntaða oddasessin, vitjaði Sumba, sum í flestum av teimum undanfarnu sjey umførunum hevur átt oddasessin.

**Kundu avgjørt**

Fyrstu løtuna av dystinum var tó ikki so nógv, sum bendi á, at hetta vóru tvey lið, sum vóru hampuliga jøvn í styrki. Gestirnir settu seg nevnliga á dystin alt fyri eitt, og tað var eisini skjótt, at hetta gav úrslit.

Eftir at bólturin varð sendur innfyri málið hjá Sumba, trokaðust menn eitt sindur aftur og fram. Endin varð, at bólturin støkk út til Bjarna Prior, og uttan stórvegis himpr smekkaði hann til av brotsteigarmarkinum, og so var 1-0.

Málið fekk á ongan hátt gestirnar at taka tað meira róligt. Teir hildu á við at trýsta, og eftir eitt sera vakurt álop kundu teir um miðjan hálvleikin økja til 2-0, tá alt endaði við, at Ruslan Screlea gjørdist púrasta einsamallur í brotsteiginum, og lyfti upp um málverjan, tá hesin kom út.

Við tveimum málum aftan fyri sá alt svart út hjá Sumba, og gestirnir høvdu eisini allar møguleikar at sløkkja alla vón, men hóast einar tríggjar upplagdar málmøguleikar, so eydnaðist teimum ikki at skjóta triðja málið, sum eftir øllum at døma hevði punkterað dystin.

**Sluppu í part**

Ístaðin var tað Sumba, sum kom inn aftur í dystin. Eftir at gestirnir høvdu fullkomuliga dominerað knappa fyrsta hálva tíman, so tóku teir á heimaliðnum alt meira yvir.

Kanska hildu vágamenn seg longu hava gjørt nóg mikið, og í øllum førum var tað nú soleiðis, at tað vóru heimamenninir, sum vunnu flestu nærdystirnar.



*Ari Johannesen og FS Vágar liggja nú væl fyri í kappingini um uppflyting, og vinna teir eisini komandi heimadystin, fer at síggja heilt ljóst út, hóat kappingin tá bert er hálvrunnin*

Beint fyri steðgin fingu teir eisini løn fyri stríðið, tó at málið var eitt av teimum heldur tilvildarligu. Hannus Olsen skuldi spæla bóltin aftur til verjuna, men hann gleið, og so gekk skjótt. Jan Poulsen var á bóltinum, og eftir at hava drigið eina ferð við bóltinum smekkaði hann til.

Í seinna byrjaði heimaliðið, har teir sleptu í fyrra. Hóast veðrið ikki var hitt besta, so stríddust teir av fullum huga, og teir fingu eisini einasta málið, sum kom eftir steðgin. Hetta hendi, tá Eirikur Joensen fekk bóltin í vinstru síðu. Hann dró nakað inneftir, og tá hann so royndi seg tók skotið í verjuleikara, soleiðis at vágamálverjin ikki hevði nakran møguleika at bjarga skotroyndini.

**Sterkir á pappírinum**

Við einasta stiginum tryggjaði Sumba sær, at munurin í oddinum í øllum førum ikki vaks, og mett eftir fyrsta hálva tímanum, so mundu teir eisini vera væl nøgdir um hetta.

Sum dysturin gekk, so kundi tað tó eins væl verið Sumba, sum fór avstað við øllum, so alt í alt mundi javnleikurin tó vera eitt rættvíst úrslit.

Vágamenn iðraðu seg sjálvandi um, at teir ikki megnaðu at binda fyri, tá teir høvdu møguleikan, men teir kundu í øllum førum staðfesta eftir dystin, at teir nú hava leikt flestu av teimum dystunum, sum á pappírinum verða roknaðir sum teir torførastu. Av hinum uppflytingarkandidatunum, er tað bert ÍF, sum vágamenninir resta at vitja, og tí standa teir so avgjørt við bestu kortunum, tá farið verður undir seinnu kappingarhálvu.

Tann dysturin er tó ikki fyrr enn í seinasta umfarinum, tí komandi vikuskifti koma fuglfirðingar á vitjan, og hetta kann væl gerast ein avgerandi dystur fyri teirra viðkomandi. Sumba vitjar tá í Runavík, har heimaliðið eftir eina sera laka byrjan tykist at hava funnið fótafestið, so eisini tað líkist eini spennandi uppgerð.

**Dysturin í tølum**

**Sumba-FS Vágar 2-2 (1-2)**
0-1: Bjarni Prior
0-2: Ruslan Screlea
1-2: Jan Poulsen
2-2: Eirikur Joensen

## Talvið hesa vikuna

**Kramnik,V (2809) - Anand,V (2752)**
**Advanced Chess rapid Leon ESP (3), 22.06.2002**

Móttikið Dronningagambit 1.Rif3 d5 2.d4 e6 3.c4 dxc4 4.e3 c5 5.Bxc4 Rif6 6.0-0 a6 7.Bb3 cxd4 8.exd4 Ric6 9.Ric3 Be7 10.Bg5 0-0 11.Fd2 Ria5 12.Bc2 b5 13.Rad1 Ric4 14.Ff4 Ra7 [14...Rixb2?? 15.Bxf6 Bxf6 16.Fe4 hóttur mát og rók] 15.Rie5 Rc7 16.Rixc4 bxc4 17.Bxf6 Bxf6 18.d5! (finnan avgerð talvið) 18...e5 19.Ff3 Rb7 20.Fe4 g6 21.Fxc4 Rxb2 22.Bb3 Bg5 23.d6 (finnan skal jú á mál) 23...Be6 24.Fa4 Bxb3 25.axb3 Fb6 26.Fg4 Bf4 27.Rid5 Fd8 28.Rixf4 exf4



29.d7 (Anand er trælabundin av framkomnu finnuni) 29...Rxb3 30.Fxf4 Rb8 31.Rfe1 Fb6 32.h4 h5 33.Rd6 Fc5 34.Ff6 Ff5 35.Fxf5 gxf5 36.Rxa6 Rfd8 37.Rd6 1-0

# Hjálp frá telduni

**Í vikuskiftinum telvaðu superstórmeistararnir Vladmir Kramnik og Viswanathan Anand ein heldur óvanligan talvdyst, har teir kundu brúka sterk talvforrit sum ráðgevarar.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Heitið á dystinum millum nummar tvey og trý í heiminum, var Advanced Chess Match. Telvað varð í Leon, Spánia. Møguleikin at nýta teldu til hjálps, er tó ikki nakað nýtt fyribrigdi í talvheiminum. Fyrr hevur verið dystast við hesum møguleika, og eisini hevur Garry Kasparov verið heitur fyri hugskotinum.

Mannagongdin varð tann, at Kramnik og Anand skuldu telva seks talv, har teir høvdu ein tíma í part til talvið, og samstundis møguleikan at nýta talvforrit sum ráðgevarar. Talvteldur, serliga talvforritini Deep Fritz (sum Kramnik skal telva ein dyst ímóti í heyst), Fritz 7.32, og Junior, eru óhugnaliga skjótar at síggja eitt nú mátmøguleikar, oftani heilt upp til 15 leikir ella meir áðrenn sjálvt mátið, og tá er talan um kravdir, ella einastu leikir. Eisini kortleggja tær allar møguleikar í ávísari støðu innan eitt sekund. Tí skuldi ein ikki trúð at møguleiki er hjá okkum deyðiligu at basa hesum ódjórum, men enn er óvíst um hvør er tann sterkari, menniskja ella teldan.

Í øllum førum kann hugsast at Kramnik og Anand mest nýttu teldurnar til sín fyrimun tá roknast skuldi sera langir variantar, og torførar støður har møguligt mát er, og hinvegin eisini tá verjast skuldi fyri avgerandi leikum móti sær. Til eitt nú byrjunarspæl, hava teir valla nýtt teldurnar eins nógv sum í miðspælinum.

Teir valdu sjálvir talvforrit til dystin, og um teir vildu kundu teir nýta upp til fleiri forrit sum ráðgevarar. Eitt nú vóru Fritz, Junior og Hiarchs til taks at velja.

**Bert ein sigur**

Av teimum seks talvunum endaðu heili fimm við javnleiki, sum tó ikki var óvæntað tá hugsað verður um tær serligu jøvnu fortreyturnar telvarnir báðir fingu. Kramnik hevði munin, tí hann vann einasta avgerandi talv í dystinum. Hetta varð triða talvið, sum er við í blaðnum í dag.

Úrslitið varð eitt petti óvæntað, eftirsum Anand er kendur fyri at duga væl at útnytta telduhjálp, men hinvegin fyrireikar Kramnik seg til dyst móti Deep Frits í heyst, og tað hevur helst givið honum summir fyrimunir.

At tiltakið var áhugavert eru mong ivaleyst samd um, men áhugin hevði helst verið enn størri um teir telvaðu dyst uttan hjálp. Tann veruligi kampurin í talvi eigur sjálvsagt at vera náturligur.

**Stríð í Hollandi**

Í skrivandi løtu eru fýra umfør telvd í hollendska meistaraskapinum, og GM Loek van Wely hevur fult stigartal, meðan GM Sergei Tiviakov og GM Ivan Sokolov eru næstir við ávíkavist hálvum fjórða stigi og trimum stigum.

Sokolov telvar nú fyri hollenska flaggið, eins og Tiviakov hevur gjørt í nøkur ár. Tí hava teir loyvið at luttaka. Sokolov er ratingfavorittur, men tungt verður hjá honum at vinna inn á van Wely aftur, sum higartil í kappingini hevur telvað sum ein røvari.